# Ynskja at leingja sáttmálaskeiðið

**At vit bjóða arbeiðsgevarunum at leingja sáttmálaskeiðið kostar sjálvsagt, tí samstundis, sum tað gevur stabilitet, er tað eisini bindandi, sigur Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum, ið fór undir samráðingar við Fíggjarmálaráðið í gjár.**

ARBEIÐSMARKNAÐUR

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Sjálvandi krevja vit hægri løn. Hesi eru orðini frá Gunnleivi Dalsgarð, nú tíðin enn einaferð er búgvin til at fara til samráðingarborðið. Men hann avdúkar ongin tøl enn, tí, sum hann sigur, so veldst tað í stóran mun um, hvussu langt sáttmálaskeiðið verður.

- Tá Starvsmannafelagið skjýtur upp, at vit leingja sáttmálaskeiðið upp í trý ella kanska fýra ár, so ræta vit í veruleikanum hondina fram og bjóða politikarunum stabilitet. Hetta er ein fongur fyri samfelagið og arbeiðsgevararnar, men slíkt kostar sjálvsagt, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

Í gjár, týsdagin, sessaðust umboð fyri Starvsmannafelagið og Fíggjamálaráðið um samráðingarborðið at seta hol á samráðingarnar, sum meiri ella minni vórðu kubbaðar av seinast, tá Starvsmannafelagið góðtók ein sáttmála, sum einans rakk eitt ár fram - 'fyri frið skyld', sum onkur vildi vera við. So verandi sáttmáli millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið er bert galdandi til 1. oktober, hetta samstundis sum, at fleiri av fakfeløgunum á almenna arbeiðsmarknaðinum ikki hava gjørt nýggjan sáttmála fyri tann, sum gekk út 1. oktober í fjør.

- Í gjár løgdu báðir partar fram síni krøv og sjónarmið til nýggjan sáttmála, og vit prátaðu eitt sindur um tey, sigur Gunnleivur Dalsgarð, sum eisini staðfestir, at ongin fundarætlan varð gjørd á fundinum.

### Nýggir tankar

- Eg vænti, at Fíggjarmálaráðið fer at taka undir við at leingja um sáttmálaskeiðið, tí tað kann bara gagna teimum, sigur Gunnleivur Dalsgarð, og hann vísir á, at Føroya Tele longu hevur gjørt tað sama.

- Hetta er eitt upplegg við nýggjum hugsanum, har til ber, at samráðast í rúmari tíð. Og tað er ein útrætt hond um stabilitet, sum sjálvsagt hevur sín prís, tí tað er eisini bindandi at binda seg so nógv ár fram, sigur Gunnleivur Dalsgarð, sum eisini vil hava ásetingar um, at avtalan kann endurskoðast, um so er, at stórar samfelagsbroytingar verða.

- Tað hevur frammanundan verið ilt at meta um gongdina tvey ár fram, og tí er sjálvsagt eisini ógjørligt at meta um støðuna longur út í framtíðina, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

Spurdur, hvørjar fyrimunir hetta hevur fyri fakfeløgini, sigur hann, at sum nú er, fer øll orkan til samráðingar og til slíkt, sum liggur beint fyri.

- Fakfeløgini hava ikki tíð til at fáast við verulig fakfelagspolitisk mál, prinsipiell mál ella at samstarva sínámillum, tá tíðin er so tepur, so tí gevur hetta okkum eisini eitt andarhol, at koma uppundan og at styrkja um innanhýsis samskiftið, sigur formaðurin í Starvsmannafelagnum, Gunnleivur Dalsgarð.



*- Tað hevur frammanundan verið ilt at meta um gongdina tvey ár fram, og tí er sjálvsagt eisini ógjørligt at meta um støðuna longur út í framtíðina, sigur Gunnleivur Dalsgarð*

### Eftirlønin á 15,5 prosent

Av øðrum, sum er millum krøvini hjá Starvsmannafelagnum til sáttmálasamráðingarnar í heyst kann vera nevnt, at eftirlønin skal upp á støðið, sum Føroya Tele kom upp á í vár, nevniliga í 15,5 prosent.

- Nú politisku myndugleikarnir tosa so nógv um at broyta pensiónsviðurskiftini, so tey koma at hvíla á trimum súlum, halda vit tað vera av alstórum týdningi, at vit fáa okkara viðurskifti uppá pláss við at tey koma upp á minst 15,5 prosent, sigur Gunnleivur Dalsgarð, sum kortini viðgongur, at hann als ikki er nøgdur við 15,5 prosent.

- Allar kanningar vísa, at vit skulu upp á eini 18 prosent, um talan skal vera um eina nøktandi eftirlønarskipan, sigur Gunnleivur Dalsgarð við Sosialin.

### Umflokkingar

Annað, sum Starvsmannafelagið borðreiddi við á fundinum við Fíggjarmálaráðið í gjár, vóru krøv um umflokkingar í lønarskipanini, har hædd verður tikið fyri, at umstøðurnar og krøvini á arbeiðsmarknaðinum broytast og at flokkingarnar tí mugu fylgja við.

- Í 2001 gjørdu vit flokkingarnar einfaldari, men kortini er alla tíðina neyðugt at endurskoða skipanina, sum vit annars hava verið sera nøgd við. Eitt nú er sjálvsagt, at starvsfólk eiga at verða umflokkað í sambandi við førleikamenning og eftirútbúgving, ella tá talan er um nýggj størv og heiti, sum skulu flokkast í lønarskipanini, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

### Arbeiðsvikan 36,5 tímar

Og Gunnleivur nevnir annað mál, sum eisini hevur verið á breddanum áður, nevniliga, at arbeiðstíðin eigur at vera ásett til reellu arbeiðstíðina, soleiðis at farið verður burtur frá, at arbeiðsvikan eitur 39 tímar, har fólk fáa ein hálvan tíma til matarsteðg dagliga.

- Vit ynskja harafturímóti, at arbeiðsvikan skal eita 36,5 tímar, og at hálvi matartímin skal liggja uttanfyri, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

Og hann vísir at enda á, at Starvs-mannafelagið skjýtur upp, at samráðingarnar millum Sev, kommunurnar og Fíggjarmálaráðið eiga at vera í senn, tí tað endar altíð úti í Fíggjarmálaráðnum kortini og úrslitið verður tað sama.

- Tað er ikki nøktandi at vit ikki fylgjast, og so fáa Sev og kommunurnar eisini veruliga ávirkan, sigur Gunnleivur Dalsgarð, sum vísir á Fíggjarmálaráðið var positivt yvir fyri hesum uppskotinum frá Starvsmannafelagnum, og tí fer at seta seg í samband við Sev og Kommunala Arbeiðsgevarafealgið beinanvegin.




Hans Pauli Strøm um sjúkratrygging:

## Smakkleyst at koma við tilboðnum nú

SJÚKRATRYGGING

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Í farnu viku boðaði Trygd frá, at teir nú kundu bjóða tað, teir rópa viðgerðartrygd. Ein sjúkratrygging, sum ger, at tú kanst fara av landinum á eitt norðurlendskt privatsjúkrahús at fáa viðgerð.

Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Hans Pauli Strøm, sigur, at hetta er ein gongd vit síggja aðrastaðni í heimi, eisini í Norðanlondum, og tí undrast hann ikki um, at fyribrigdi nú eisini er komið til Føroya.

- Hetta tilboðið kann vera eitt ískoyti til verandi skipan, men hetta er ikki eitt tilboð fyri øll, slær landsstýrismaðurin fast.

- Hetta tilboðið er avmarkað til tey, sum eru virkin á arbeiðsmarknaðinum við regluligum og føstum inntøkum, og faktiskt eru frísk og væl fyri, so hetta er ein kvalitativur munur í mun til okkara sjúkrahúsverk, sigur Hans Pauli Strøm, og vísir á, at teir stóru brúkararnir av sjúkrahúsverkinum ikki kunnu gera sær dælt av nýggja tilboðnum.

- Teir stóru brúkararnir av sjúkrahúsverkinum í dag, eru tey gomlu, tey, sum eru varandi sjúk ella verða varandi sjúk og fólk, sum bera brek, og í hini skipanini hava tey eitt lágt tryggingarvirði.

- Okkara sjúkrahúsverk er eitt tilboð fyri øll, staðfestir Hans Pauli Strøm.

Hans Pauli Strøm sigur eisini, at tað vísir seg, at privatsjúkrahúsini oftani eru dýrari at reka enn tey almennu, og at fleiri pengar verða brúktir til bureaukrati og pappírsarbeiði á privatu sjúkrahúsunum, og nevnir USA sum dømi.

- USA og Norðanlond vera mett at hava nøkulunda sama sjúkrahússtøði, men í USA brúkar tey 14 prosent at bruttutjóðarúrtøkuni til sjúkrahúsini, meðan tað í Norðanlondum verða nýtt 8 prosent av bruttotjóðarúrtøkuni til sjúkrahús, sigur Hans Pauli Strøm og greiðir víðari frá, at orsøkin til tað er hon, at tað almenna sjúkrahúsverkið er meiri effektivt.

Hans Pauli Strøm heldur annars ikki nógv um, at Trygd velur at koma við teirra tilboði júst nú, meðan sjúkrahúsverki er fyri so hvøssum atfinningum.

- Eg eri rættiliga skelkaður av, at tey velja at koma við tilboðnum júst nú, og eg haldi tað vera rættiliga smakkleyst av teimum. Tey áttu at kent sær hógv og bíða, nú støðan er sum hon er og sjúkrahúsið er fyri so hørðum atfinningum. Eisini sjálvt um teir hava ætlað hetta longi, men tað er so teirra væl, ásannar landsstýrismaðurin.

Hans Pauli Strøm sigur annars, at batar til sjúkrahúsverkið eru í væntu.

- Vit eru byrjaði at útbyggja og lyfta okkara sjúkrahúsverk, soleiðis at vit fáa tað fram í fremstu røð.

- Tørvurin á serlæknum hevur longi verið ein trupulleiki, men vit eru so farin undir at útvega fleiri serlæknar so hesin tørvurin minkar, sigur Hans Pauli Strøm og vísir til fíggjarlógaruppskotið, sum tað verður arbeitt við í løtuni, har arbeitt verður fyri at gera pláss fyri einum krabbameinslækna og einum neurologi, sum tað hevur verið rópt eftir í langa tíð.

- Eisini verður arbeitt við at bøta um læknatænastuna á hinum sjúkrahúsunum, og í Suðuroy verður arbeitt við at fáa ein medisinskan lækna, sigur Hans Pauli Strøm og vísir eisini á fleiri batar, sum eru komnir og eru ávegis.

Landsstýrismaðurin vísir eisini á nógv verður gjørt fyri at hække um tænastustøði. Hann nevnir eitt nú arbeiði, ið gjørt verður fyri at skapa betri fysiskar karmar til Landssjúkrahúsið og sigur, at tær 105 milliónirnar, ið eru játtaðar til at nútímansgera Landssjúkrahúsið frá 2006 til 2008, bara eru fyrsti partur av eini ætlan upp á 350 milliónir.

Spurdur beinleiðis um, um hann sjálvur ætlar at tekna eina viðgerðartrygd hjá Trygd, er Hans Pauli Strøm avgjørdur í sínum svari.

- Nei, tað síggi eg onga grund til, sigur landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum.